inni - trygt og ómaksleyst til hús



## Sethús – Selatraðsvegur 861, Selatrað

Húsini eru í 2 hæddum – samlað búvídd 174 fermetrar. Harafturat er ein hjallur í 2 hæddum – í alt 56 fermetrar. Grundøkið er uml. 400 fermetrar. Byggiár 1982. Grundin og endaveggirnir eru stoyptir. Húsini eru kløðd við timbri og hava flagtak. Meginparturin av vindeygunum í miðhæddini eru plastikk og restin er timburvindeygu. Í ovaru hædd er durur, wc, gongd, køkur, 2 stovur, goymslurúm og hjallur. Í niðaru hædd er gongd, 3 kømur, hjúnarrúm, baðirúm og kjallararúm / fýrrúm / vaskirúm. Húsini standa frítt fyri og hava sera gott útsýni. Prísuppskot: kr. 1.300.000,00.



## Sethús – Hvalvíksvegur 61, Hvalvík

Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd uml. 145 fermetrar umframt ein hjall. Grundin er stoypt og húsini eru kløðd við alminiumsplátum og hava stáltak. Grundøkið er uml. 240 fermetrar. Byggiár: 1912. Í miðhæddini er gongd, køkur og 2 stovur. Í ovastu hædd er gongd, baðirúm og 3 kømur. Í niðastu hædd er kjallararúm / fýrrúm / vaskirúm. Húsini standa við vegin og hava gott útsýni.



## Sethús – Torfinsgøta 25, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum á 103 fermetrar - í alt 206 fermetrar. Grundøkið er 418 fermetrar. Byggiárið er 1963, men húsini eru dagførd og umvæld 2000-2007. Nýtt er m.a. tak, klædningur, vindeygu, radiatorar, hitaverk. Í erva er inngongd, durur, gongd, køkur, borðsstova, stova við útgongd, til altan / terassu, hjúnarrúm, baðirúm, 2 kømur og niðurgongd til kjallara. Í neðra er inngongd, gongd, vaskirúm / fýrrúm og garaga umframt sjálvstøðuga íbúð: Har er inngongd, durur, gongd, køkur, borðsstova, kamar. Húsini standa sera væl fyri í vøkrum urtagarði í friðarligum og hugnaligum umhvørvi nær miðbýnum. Stutt er til handlar, skúlar, dagstovnar og busssamband.



## Sethús – Heygagerði 20, Sandavágur

Snotiligu sethúsini eru í 2 hæddum á 128 fermetrar - í alt 256 fermetrar. Grundøkið er 1540 fermetrar. Húsini er bygd í 1987, men eru dagførd so við og við frá 2003 til 2005 og eru í sera góðum standi. Í ovaru hædd er inngongd, durur, gongd, køkur / borðstova / stova við útgongd til svala, hjúnarrúm, baðirúm, 2 kømur, hjallur og amboðsrúm. Í niðaru hædd er inngongd, durur, trappugongd / alrúm, kamar, vaskirúm / fýrrúm, kjallararúm og bilhús. Húsini standa í veðurgóðum, friðarligum, barnavinarligum og náttúruvøkrum umhvørvi. Har er sera gott útsýni yvir bygdina og fjørðin og góður sólargangur. Prísuppskot: 1.600.000,00



## Sethús – Dalavegur 20, Glyvrar

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd uml. 180 fermetrar. Grundøkið er uml. 1400 fermetrar. Byggiár uml. 1960. Í 1990 bleiv stórur partur av húsinum nýgjørdur. M.a. er køkur, stova, gongd og flestu vindeygu í ovaru hædd skift. Í ovaru hædd er durur, 2 gongir, køkur, stova, kamar, hjúnarrúm, baðirúm, goymslurúm, vaskirúm, hjallur og útigólv (terassa). Í niðaru hædd er gongd, kamar, goymslurúm og fýrrúm. Húsini standa í veðurgóðum umhvørvi og hava sera gott útsýni yvir fjørðin. Prísuppskot: kr. 1.300.000,00.



## Sethús – Víkavegur 9, Haldarsvík

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd uml. 126 fermetrar umframt ein hjall. Grundøkið er 261 fermetrar. Byggiár:1954. Niðara hæddin var gjørd av nýggjum í 80'unum, og takið er skift í 2001. Í ovaru hædd er gongd, 2 kømur, hjúnarrúm, stór stova, wc og goymslurúm. Í niðaru hædd er durur, baðirúm, køkur, stova, kjallararúm / fýrrúm. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



## Sethús í gerð – Gerðisgøta 10, Skála

Húsini verða í 2 hæddum, niðara hæddin 120 fermetrar og ovara hæddin 75 fermetrar – í alt 195 fermetrar. Grundøkið er 581 fermetrar. Húsini verða innilokað, og keyparin kann síðan sjálv/ur gerða av, hvussu tey vilja hava tey innrættað. Ásetti kostnaðurin umfatar stoyptan sokkul við áløgdum undirsløgum, innilokaði hús við Viking Window úthurðum, trævindeygum og bjálvaðum útveggjum, álagt tætt tróður og aluminiumtak við Icopal plasttakrennum. Farið verður undir at byggja, tá keypari er til húsini. Húsini koma at standa mitt í bygdini við góðum útsýni út yvir fjørðin. Prísuppskot: kr. 1.075.000,00.



## Raðhús – Tórsbyrgi 28, Tórshavn

Húsini eru eini raðhús í 3 hæddum - samlað búvídd uml: 165 fermetrar. Hartil er útigólv á 12 fermetrar og eitt goymslurúm á 12 fermetrar við hálvum lofti. Húsini eru bygd í 1976, men eru síðani umvæld og dagførd. Bústaðarlýsing er tøk. Í niðastu hædd er inngongd, durur, gongd, skrivstova, baðirúm, 2 kømur, vaskirúm og útigólv. Í miðhæddini er gongd, stór stova, køkur og wc. Í ovastu hædd er trappurúm og 2 kømur. Felags hitaskipan og antennuskipan er. Húsini standa í friðarligum, barnavinarligum og hugnaligum umhvørvi við góðum grannalagi og hava gott útsýni. Prísuppskot: kr. 2.200.000,00. Skrivlig boð kunnu latast inn til 1. november 2007 kl. 15.00.



## Jørð – Skálavegur og Dalsvegur, Vágur

Ognin er jørð í Vági matr.nr. 357, 358 og 650 á í alt 11.590 fermetrar, ið liggur sera væl fyri og m.a. partvíst kann nýtast til grundøki. Til traðarstykkini, sum eru á í alt 9.337 er uttangarðsjørð matr.nr. 650 í Innaraparti í Toftahaga. Annað grundøkið er 1.225 fermetrar til víddar og kann lutast í 2 stykki á góðar 600 fermetrar. Hitt grundøkið er 1.028 fermetrar til víddar og kann lutast sundur í 2 stykki á góðar 500 fermetrar. Vegur er til grundstykkini og trøðina. Grundøkini liggja ovarlaga mitt í bygdini við sera góðum útsýni yvir bygdina og fjørðin. Ognin verður seld, um hóskandi boð fæst.



## Sethús – á Teigi 8, Tórshavn

Dámligu húsini eru í 2 hæddum - í alt 146 fermetrar. Grundøkið er 484 fermetrar. Byggiár: 1988. Húsini eru úr góðum tilfari, eru dagførd, væl hildin og í góðum standi. Í neðra er inngongd, durur, gongd / trappugongd, baðirúm, 2 kømur, bryggers / vaskirúm / fýrrúm við útgongd til útigólv / sólkrók, hjallur, matarkøkur, borðstova / stova við opnum tróðri. Í erva er alrúm / arbeiðsrúm / stova, hjúnarrúm og goymslurúm, ið er klárt at gera til klædnarúm og baðirúm. Garagan er stoypt og klár at gera liðug, og garður / urtagarður við sólkróki er runt húsini. Húsini standa í veðurgóðum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi. Spæliplláss og fótbóltsvøllur við graslíki er nærhendis. Húsini standa nær býnum og stutt er til skúlar, dagstovnar og handlar.



## Snotilig sethús – undir Gráasteini 10, Kvívík

Snotiligu húsini eru í 2 hæddum - hvør á $94m^2$ - í alt 188 $m^2$. Grundøkið er $792m^2$. Byggiár: 1978, men húsini eru nýgjørd og dagførd. M.a er drenað og steinsett av nýggjum runt húsini, og klædningur, vindskeið, hjallur, fleiri vindeygu, allir sprossar, gólv, fleiri loft, listar, inn- og úthurðar, køkur, baðirúm og kamar í niðastu hædd er nýtt, og restin er alt nýtapetað og málað, kjallarin er pussaður og málaður, og klædningur og tak er nýmálað. Alt er sera snotiligt og sera væl hildið úti og inni. Har er hjallur, inngongd, durur / gongd, køkur / alrúm, borðsstova / stova, hjúnarrúm, baðirúm og 3 kømur. Í neðra er trappugongd, kamar, fýrrúm / vaskirúm / kjallarúm við egnari inngongd. Møguleiki er fyri at innrætta restina av niðastu hædd. Skotskir brotflísar til túnið fylgja við. Møguleiki er eisini fyri, at tað mesta av innbúgvinum kann fylgja við. Húsini standa í sera hugnaligum og náttúruvøkrum bygdaumhvørvi. Har er veðurgott, barnavinaligt og sera gott útsýni. Stutt er til busssamband, barnagarð, skúla og handil og bert 20 min. er til Havnar. Prísuppskot: kr. 1.400.000,00.



## Sethús – Tungugøta 11, Tórshavn

Húsini eru í 3 hæddum á 47 fermetrar - í alt 141 fermetrar. Grundøkið er 233 fermetrar. Í miðhæddini er inngongd, durur / trappugongd, matarkøkur og borðsstova / stova. Í ovastu hædd er hjúnarrúm við útgongd til altan / terassu við frálíkum útsýni yvir býin, baðirúm og 2 kømur. Í niðastu hædd er sjálvstøðug íbúð. Har er inngongd, durur, køkur, stova / kamar, baðirúm og fýrrúm / kjallari við egnari inngongd. Garður / urtagarður er runt húsini, sum standa í veðurgóðum og friðarligum umhvørvi mitt í miðbýnum. Stutt er til alt og frálíkt útsýni er av loftinum.

**Vit hava stóran eftirspurning eftir húsum og hava selt so nógv, at vit hava nærum útselt. Tí søkja vit eftir ognum at selja. Hevur tú hug til at selja – vinaliga, set teg í samband við okkum í Inni.**

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Sosialurin